

www.oljan.fo

**Jan Müller** 16 - 04 - 2012

# Lloyd's ávarar ímóti oljuvirksemi í Arktis

Heimsins største tryggingarfelag, Lloyd's í London, ávarar nú um, at ov stórt virksemi í tí arktiska økinum kann oyðileggja ta vistfrøðiligu skipanina. Sambært bretska blaðnum The Guardian er Lloyd's tann fyrsta stóra fyritøkan, sum ávarar um vandan fyri, at oljuboring í tí arktiska økinum kann skaða umhvørvið. Roknað verður við, at tey næstu tíggju árini fer vinnulívið at gera íløgur fyri einar 100 milliardir dollarar í "the far north". Millum tær størstu verkætlanirnar eru Shtokman, hvørs ílgøgur fara at liggja um 50 milliardir dollarar, og Yamal/Nenets hjá BP, sum fer at liggja um 10 milliardir dollarar. Men aðalstjórin í Lloyd's, Richard Ward, vil nú hava oljufeløgini til at fara eitt stig aftur eftir hæli og at umhugsa avleiðingarnar. Orsøkin til tilmæli hansara er ein frágreiðing, sum Lloyd's hevur skrivað saman við stovninum Chatham House Thinkthank. Í frágreiðingini verður staðfest, at tað er "mest sannlíkt", at komandi virksemi í tí arktiska økinum fer at órógva vistfrøðiskipaninar. -Hetta fer at ávirka ferðarmynstrið hjá villum reinsdjórum og hvali. Tað er heldur ikki bara beinleiðis lekar og dálkandi evni, sum kunnu órógva vistfrøðiskipaninar, men eisini rørleiðingar, vegir, gangur frá boring, seismiskt virksemi og størri skipaferðsla, stendur í frágreiðingini.